# Kaðalin tryggjar Føroyum trygt fjarskifti

**Fríggjamorgunin legði 6000 tons stóra kaðalskipið »IT Intrepid« SHEFA 2 kaðalin upp á land á Hvítanesi. Kaðalin tryggjar Føroyum trygt og munagott fjarskifti við útheimin í nógv ár frameftir**

SAMSKIFTI



*Kaðalskipið »IT Intrepid« út fyri Hvítanesi. Skipið kemur á Havnina seinnapartin fríggjadagin, og møguleiki er at vitja umborð frá kl. 16. Skipið fer avstað aftur sunnudagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjamorgunin legði 6000 tons stóra kaðalskipið »IT Intrepid« SHEFA 2 kaðalin upp á Hvítanesi. Talan er um kaðalin, sum Føroya Tele leggur millum Føroyar og skotska meginlandið. Tá er fyrsti parturin av kaðalinum lagdur millum Føroyar og Hetland, og síðani verður restin løgd ímillum Hetland, Orknoyggjarnar og Skotland.

Føroya Tele hevur átikið sær at framtíðartryggja fjarskiftissambandið við útheimin við sjókaðalum. Tað verður gjørt við SHEFA 2, sum kemur afturat FARICE-kaðlinum millum Ísland, Føroyar og Skotland, ið var tikin í nýtslu í 2004, og Cantat 3, sum er "back up" hjá FARICE.

SHEFA 2 og FARICE kaðalsambondini fara at geva Føroyum at kalla óavmarkaða fjarskiftisorku mótvegis umheiminum, og fjarskiftistørvurin hjá føroyingum mótvegis útheiminum verður sostatt nøktaður í nógv ár frameftir. SHEFA 2 kaðalin kostar 120 milliónir krónur.

"SHEFA 2 er eisini ein fyritreyt fyri, at Føroya Tele kann víðka heimamarknaðin út um Føroyar. Eitt nú síggja vit møguleikar í at samstarva við oljufeløg um fjarskiftið út á oljupallar, tá SHEFA 2 er liðugur. Kaðalin fer somuleiðis at gagna øðrum føroyskum fyritøkum, sum ynskja at vaksa út um landoddarnar", metir Kristian Davidsen, stjóri í Føroya Tele.

**mg**



# Heystarveður um vikuskiftið

Ætlar onkur sær at gera okkurt arbeiði uttandura leygardagin, so er at fara ára á føtur. Tá verður gott veður, men seinnapartin verður illveður. Fyrrapartin í morgin verður nevniliga ein góð løta, men tá komið er nakað út á dagin kemur broyting í. - Hann veksur upp í hvassan vind og møguliga eisini skrið av suðri. Og tað verður eisini regn, sigur veðurmaðurin Petur Skeel Jacobsen. Hitin verður millum 9 og 12 stig. Sunnudagurin verður merktur av hvøssum vindi og ælingi, men sólin kann kortini kaga fram í løtum. Mánadagurin fer at líkjast leygardegnum rættiliga nógv, um ein líka sær burtur frá hitastigunum. Dagurin byrjar góður, men seinnapartin verður hvassur vindur av norðuri og ælingur. Tað verður haraftrat kaldari, niður í 3-6 stig, og fer tað at vísa seg við hvítum fjallatoppum. Hinvegin kunnu vit síggja fram til gott veður bæði týsdagin og mikudagin. Hann verður høgur í ættini, tað verður turt og sólin kemur fram. - Hitin verður tá millum 6 og 10 stig, lovar Petur Skeel.


ÚTSØLAN
byrjar mánamorgunin 24. september kl. 9.00



Klæðningar
flott úrval
áður 3498,-
nú bara 1998,- & 1298,-

Skjúrtur
v. longum og stuttum ermum
Ein bara 198,-
Tak tvær 300,-

Klæðningsjakkar
í klassiskum litum
áður úr 2198,-/ 1798,-
nú bara 899,-



Flottir, léttir vindjakkar
v. stretch
áður 1588,-
nú bara 598,-

Allar
Meyer klæðningsbuksur
áður 998,-
Einar bara 698,-
Tak tvinnar 1200,-



Arbeiðs-terylenebuksur
einar 598,-
Tak tvinnar - bara 900,-
Avmarkað nøgd!

Alt í rótikassanum
100,- stk.

Arbeiðs-cowboybuksur
Einar 298,-
Tak tvinnar - bara 400,-

T-shirts
við ella uttan rullukraga
áður 298,-
nú bara 98,-

Gant
skjúrtur - troyggjur - buksur
-50%

Lee cowboybuksur
stonewashed og svartar
Einar 598,-
Tak tvinnar - bara 900,-

Allar
Eton og Boswell skjúrtur
-10%

Roberto
Kanvasbuksur
í svartar og beige - áður 598,-
Einar 398,-
Tak tvinnar - bara 600,-



TEAM 85

Smyrilsvegur 7 · Tel 317210 · Fax 317806

Hans Joensen
Síðan 1889